

**FAKTA**

**Navn:** Daniel Udsen
**Føddur:** 2. september 1983
**Feløg:** Hvidovre, Albertslund, Greve, FC Amager, FC Vestsjælland, Vanløse og EB/Streymur
**Dystir/mál fyri EB/Streym:** 22/8
**Landsdystir:** 5

*Daniel Udsen iðrar seg um, at hann ikki vann Føroyameistaraheitið við EB/Streymi í ár. Tað er eisini ein avgerandi orsøk til, at hann ætlar sær aftur til Føroya*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Eg eri ikki liðugur við Føroyar

**FÓTBÓLTUR Fær Daniel Udsen sín vilja, so spælir hann við EB/Streymi næsta kappingarár. – Bæði EB/Streymur og eg fingu eina keðiliga byrjan, sum í síðsta enda kostaði okkum Føroyameistaraheitið. Tí føli eg, at eg ikki eri heilt liðugur við Føroyar og føroyskan fótbólt, sigur danski føroyingurin**

Rólant Waag Dam

Kappingarárið hjá EB/Streymi og persónliga gongdin hjá Daniel Udsen fylgdust lið um lið. EB/Streymur fekk eina sera ringa byrjan og Daniel Udsen gjørdist skaddur rættiliga tíðliga í kappingarárinum.

– Ringa byrjanin kostaði okkum Føroyameistaraheitið. Tá alt kom til alt vóru vit nær við, men mongu mistu stigini tíðliga á árinum kostaðu dýrt í síðsta enda. Hjá mær tók tað eisini langa tíð, áðrenn eg fekk víst nakað av tí, eg kann. Eg bleiv skaddur, og brúkti tíð um at koma fyri meg. Sjálvur haldi eg, at seinna hálva var á eini leið, men eins og eg ikki havi vunnið FM, so havi eg heldur ikki víst, hvat eg kann yvir eitt heilt kappingarár, greiðir Daniel Udsen frá.

Tað er púra greitt, at maðurin als ikki hevur slept Føroyum og føroyskum fótbólti. Hann tosar javnan við vinmenninar í EB/Streymi, fræ ttir tíðindi um leikarar, sum hava longt og so aðrar, sum eru knýttir at felagnum.

– Eg hugsi um nógv um, at vit ikki vunnu Føroyameistaraheitið. Eisini nú, eg eri komin aftur til Danmarkar. Høvdu vit vunnið og eg hevði spælt heilt fantastiskt, so hevði støðan helst verið øðrvísi hjá mær. Men nú gjørdust vit ikki Føroyameistarar, og eg náddi ongantíð heilt upp á tað støðið, sum eg havi verið á onkuntíð. Tí kenni, at eg ikki havi gjørt burtur av mær, sigur Daniel Udsen.

## Tveir partar at samráðast við

Danski miðvallarleikarin við føroysku ommuni hevur, síðani hann kom aftur til Danmarkar, tosað javnan við Rólant Højsted, formann í EB/Streymi.

– Nøkur onnur føroysk feløg hava spurt seg fyri, men teimum havi eg víst burtur. Komi eg aftur, verður tað til EB/Streym, sigur Daniel Udsen ivaleysur. Og lítið er at ivast í, at tey í EB/Streymi heldur enn gjarna siggja Daniel Udsen aftur í blá-svarta búnanum.

Trupulleikin er bara tann, at Daniel Udsen ikki einans hevur seg sjálvan at hugsa um.

– Tú kanst næstan siga, at eg skal samráðast við tveir partar. Annar er EB/Streymur, um treytirnar fyri sáttmálan, hitt er unnustan, sum býr í Danmark, sigur Daniel Udsen skemtandi.

Unnustan lesur í Danmark og hevur tískil ikki møguleika at flyta við Daniel til Føroya.

– Sjálvur hevði eg eitt fantastiskt ár í Føroyum. Bæði upplivingarnar á fótbóltsvøllinum, men eisini sosialt. Men tá eg fór til Føroya avtalaðu unnustan og eg, at talan var um eitt ár. Persónliga vil eg tó gjarna aftur, og nú royna vit at finna eina loysn har, greiðir Daniel Udsen frá.

## Hugsar um landsliðið

Ein annar faktorur, Daniel Udsen eisini hugsar um, er sessurin á landsliðnum.

– Tað er greitt, at eg havi betri møguleikar at vísa meg fram fyri landsliðsvenjaranum í Føroyum enn í tí felagnum, eg kom frá. Og upplivingarnar á landsliðnum eri eg ómetaliga fegin um. Eitt er at spæla fyri fleiri túsund áskoðarum og í móti leikarum, tú annars bara sært í sjónvarpinum. Hitt er at verða settur upp á prøva á hægsta stigi. Persónliga haldi eg, at tað var sera stuttligt at verða royndur soleiðis. Ikki minst, tá tað gekk sum tað gjørdi í móti Norður Írlandi, sigur Daniel Udsen.

– Men, legggur Daniel Udsen aftrat, tá eg ynski at koma aftur til Føroya, er tað fyrst og fremst tí, at eg hevði so nógvar góðar upplivingar við EB/Streymi og fólkunum kring felagið.

Ræðist ikki kappingina

Síðani Daniel Udsen fór aftur til Danmarkar, hevur EB/Streymur knýtt tveir leikarar at hópinum, sum annaðhvørt mugu metast sum avloysarar ella kappingarneytar hjá honum. Bárður Olsen og Levi Hanssen eru komnir aftrat, men tað bara fegnast Daniel Udsen um.

– Eg eri bara glaður, tá eg hoyri, at leikarar hava longt sáttmálan og nýggir mans koma aftrat. Tað styrkir hópin og økir um kappingina. Tað er gott og tað hava vit brúk fyri í EB/Streymi, um vit vilja vinna Føroyameistaraheitið, sigur Daniel Udsen.

rolant@sosialurin.fo